# ÁRVAKIN LÍVVERJI BJARGAÐI REAGAN

TANN **30. MARS Í 1981** VARÐ **NÝVALDI** AMERIKANSKI FORSETIN, **RONALD REAGAN**, **SKOTIN** UTTAN FYRI WASHINGTON HILTON HOTEL Í **WASHINGTON**. FORSETIN SKULDI EINANS GANGA **NØKUR** FÁ FET FRÁ **HOTELLINUM** Í BILIN, IÐ **BÍÐAÐI** EFTIR HONUM. ÚR **MANNAMÚGVUNI** TREIN TÁ TANN SINNISSJÚKI **JOHN HINCKLEY** OG **SKEYT SEKS** SKOT EFTIR **FORSETANUM**. EITT RAKTI HANN Í **BRINGUNA**. VARÐ **REAGAN** IKKI **BEINANVEGIN** KOYRDUR Á **SJÚKRAHÚS**, HEVÐI HANN **NEYVAN** SLOPPIÐ VIÐ **LÍVINUM**



**SØGA**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Ársdagarnir fyri skakandi hendingar eru tíverri mangir, og tann 28. februar í ár vóru liðin 25 ár, síðan svenski forsætisráðharrin, Olof Palme, varð myrdur. Mikudagin 30. mars vóru liðin 30 ár, síðan ein skottilburður í Washington kundi havt kostað Ronald Reagan lívið. Reagan hevði tá einans verið amerikanskur forseti í 69 dagar. Maðurin, ið skeyt, var tann 23 ára gamli John Hinckley. Hann skeyt forsetan, tí hann vildi vinna tokkan hjá sjónleikarinnuni, Jodie Foster, ið hann var sjúkliga hugtikin av.

Ronald Reagan hevði á forsetavalinum 4. november í 1980 vunnið ein lemjandi sigur á Jimmy Carter. Hann fekk 50 prosent av atkvøðunum og Jimmy Carter einans 41 prosent. Reagan vann í 44 statum og Carter bara í seks. Valið var ein sonn republikansk kollvelting og høgrasnaring í amerikonskum politikki, ið m.a. hevði við sær, at retorikkurin ímóti Sovjetsamveldinum herdist. Í dag minnast vit m.a. stjørnukrígsætlanina, toppfundin millum Gorbatjov og Reagan í Reykjavík og dagarnar í 1990, tá Sovjetsamveldið upploystist.

## Ilt í bringuni

Spurningurin er tó, um søgan hevði lagað seg soleiðis, sum hon gjørdi, um ein av lívverjunum hjá Ronald Reagan, Jerry Parr, ikki skundisliga skumpaði Reagan inn í bilin, ið bíðaði eftir forsetanum uttan fyri Washington Hilton Hotel kl. 14.27 tann 30. mars í 1981. Støðan hjá Reagan var onki serlig, tá hann var komin í bilin. Hann hevði ilt í bringuni og helt, at hann hevði brotið eitt rivjabein í teirri løtu, hann varð skumpaður inn í bilin. Tá hann hostaði blóð, helt hann, at hann hevði bitið seg í vørrina.

Jerry Parr var als ikki álvuligur við støðuna. Hann helt, at eitt brotið rivjabein hevði punkterað annað lungað hjá forsetanum og gjørdi tí av ikki at fara til Hvítu Húsini við Reagan, sum ætlanin hevði verið, men at koyra hann á George Washington University Hospital. Fýra minuttir eftir skottilburðin komu teir á sjúkrahúsið. Hóast Jerry Parr hevði biðið um, at sjúkrahúsið var til reiðar við eini børu, tá teir komu, stóð ongin fyri teimum við inngongdina.

Ronald Reagan reistist úr bilinum og kravdi at sleppa at ganga sjálvur inn á sjúkrahúsið. Komin inn í gongina hevði hann ilt við at anda, beinini ristust, og hann setti annað knæið fyri seg. Jerry Parr og onnur hjálptu honum inn á skaðastovuna, og tá eitt av starvsfólkunum spurdi eitt av hjálparfólkunum hjá Reagan, hvør sjúklingurin var, skiltu tey bilsnu starvsfólkini, at sjúklingurin í teirra kønu hondum var tann nývaldi amerikanski forsetin.

> »Hóast Jerry Parr hevði biðið um, at sjúkrahúsið var til reiðar við eini børu, tá teir komu, stóð ongin fyri teimum við inngongdina

Læknin, ið kannaði Reagan, legði skjótt til merkis, at blóðtrýstið hjá Reagan var fallið nógv orsakað av skelki. Farið varð undir at viðgera forsetan beinanvegin, og Jerry Parr gjørdist ovfarin, tá læknin segði honum, at forsetin var skotin. Hann helt framvegis, at Reagan hevði punkterað annað lungað av einum brotnum rivjabeini. Nancy Reagan, kona forsetan, kom nú algoyst á sjúkrahúsið, og tá hon steig inn á sjúkrastovuna, læt í gamla sjónleikaranum í forsetasessinum: »Honey, I forgot to duck!«

## Fýra mans raktir

Skurðlæknin á sjúkrahúsinum gjørdi av, at Reagan skuldi leggjast undir skurð, tí hann bløddi illa. Tey, ið vóru við til skurðviðgerðina, vistu ikki, at kúlan, ið John Hinckley hevði skotið forsetan við, kundi bresta hvørja løtu. Tað gjørdi hon tó ikki. Kúlan varð tikin, og á skurðstovuni var Ronald Reagan framvegis í góðum lag. Eina ferð tók hann iltmaskuna av andlitinum og segði seg vóna, at starvsfólkini vóru republikanarar. Tað eru vit øll í dag, svaraði ein lækni flennandi, sum tó ikki var republikanari.

Skurðviðgerðin tók tríggjar tímar og bjargaði lívinum hjá forsetanum.